## … um føðingardagar

Eg haldi, at tað er ein góður siður, at føroyingar ganga so nógv í føðingardag hjá hvørjum øðrum. Eg haldi, at hetta er ein framíhjárættur, sum vit føroyingar hava, tí vit enn koma hvørjum øðrum við. Tað er í øllum førum meiri lívsjáttandi enn bert at ganga til jarðarferð hjá hvørjum øðrum. Vit halda altíð føðingardagar heima hjá okkum, og tað man vera sum hjá teimum flestu, at vit bjóða ongum, men øll eru vælkomin.



## … um øvundsjúku

Tað er eitt drepandi fyribrigdi. Eg haldi eisini, at tað sæst innanfyri ítróttin, tí fólk eru ofta ov skaðafró. Tað er harmiligt, at fólk gleðast líka nógv um, at tað gongst illa hjá øðrum, sum at tað gongst væl hjá teimum sjálvum. Tað er spell, tí tað ger, at fokus verður sett á tað negativa. Men eg haldi ikki, at tað er verri her hjá okkum, enn tað er aðrastaðni. Vit áttu tó at dugað betri at gleðst saman, og hugsa um, at eingin er verri farin av, at tað gongst væl hjá øðrum

# tur



liðnum stendur klárur í minninum. Tað var ikki langt fráliðið síðani kríggið, og tað var ein sterk uppliving at síggja, hvussu illa landið var farið. Bygningar vóru gjøgnumgataðir av skotholum, og kirkjugarðar sóust allastaðni. Men so, beint áðrenn vit skuldu byrja at senda beinleiðis frá dystinum, fór streymurin um alt stadion. Tað var bølamyrkt og einki at gera, vit fingu ikki sent. Men so frættu vit heimanífrá, at streymurin eisini var farin í Føroyum, júst somu tíð, og at øll har heima eisini sótu í myrkri. So var bara at vóna, at streymurin kom fyrr aftur hjá okkum, so hyggjararnir ikki skuldu merkja nakað. Tað hendi tíverri ikki, haha, og øll í Føroyum sótu og bíðaðu eftir, at streymurin skuldi koma aftur í Bosnia.

*Er nakað, ið tit hava flent at?*

- Ja, eg minnist einar oyggjaleikir, tá eg skuldi dekka triathlon. Tað hevði eg ikki gjørt áður, og eg visti ikki heilt hvussu tað gekk fyri seg. Men beint áðrenn kappingin skuldi byrja, fekk eg so fatur á føroyska luttakaranum og gjørdi eina samrøðu við hann. Eg var so upptikin av prátinum, at eg ikki hoyrdi startskotið smella. Knappliga sóu vit bara, at allir hinir luttakararnir hildu til beins, og eg kvetti setningin, sum eg var í holt við, av, og rópti "far!, far!". Og so gassaði hann avstað. Men tað kom við uppá kamera, at eg geylaði á hann, at hann skuldi fara. Og tað kom eisini í kabarettina tað árið, haha.

### Góður við ítróttarfólk

*Gerst tað aldri einstáttað bert at arbeiða við ítrótti?*

- Nei, um eg helt tað, so var eg nokk ikki rætti maðurin til hetta arbeiðið. Men tað er nokk sum við øllum øðrum arbeiðum, at man viðhvørt hevur góðan hug, og aðrar tíðir er hugurin eitt sindur minni. Men tiltøk sum oyggjaleikir eru avgjørt við til at toga tað upp. Ikki tí, tað er ógvuliga strævið at dekka t.d. oyggjaleikir, tí vit arbeiða frá tí vit vakna, og til vit lata eyguni aftur um kvøldið, men tað er ein heilt serstakur stemningur. Og tað eru ofta tey somu fólkini, sum eru við, so man kemur at kenna tey rættiliga væl. Og man verður á ein hátt nokkso góður við øll hesi fólkini, tí man fylgir nógvum teirra ígjøgnum fleiri ár.

*Hvussu er at arbeiða við føroysku ítróttarfólkunum?*

- Eg má siga, at tey eru óalmindiliga opin og lætt at koma í samband við. Tað er faktiskt rættiliga hugtakandi at arbeiða við føroyskum ítróttarfólkum. Av og á kunnu fólk blíva fratør, um vit t.d. hava víst okkurt, sum ikki gagnar teimum og teirra felagi, men vit mugu jú vísa tað, sum fer fram undir hesum ymisku kappingunum - eisini tað minni pena. Men sum heild eru tey stuttmint, tá tað kemur til slíkt, og næstu ferð eg tosi við tey, eru tey blíð aftur. Harafturat haldi eg, at føroysku ítróttarfólkini veruliga brenna fyri tí tey gera, og tí eru tey eisini so áhugaverd at práta við.

*Fer Tórður Mikkelsen at starvast á 3-2 restina av sínum arbeiðslívið?*

- Í løtuni dámar mær tað væl, so eg ætli mær ikki at gevast í bræði. Men tað er sjálvsagt so nógv annað spennandi arbeiði, sum eg kundi hugsað mær at farið undir. Til dømis at gjørt sendingar um mannalagnur. Men 3-2 er tað rætta fyri meg beint nú, og eg haldi eisini, at vit hava funnið rætta leistin til sendingina. Tað er ein rútma, har 3-2 livir sítt egna lív, og fólk kenna tað. Tað er sjálvandið við hjálp frá nógvum góðum fólki, bæði teknikarum, freelansarum og øðrum, men eg haldi, at tað fungerar væl nú. Tað koyrir bara.

## Fakta

- Fyrsta 3-2 sending varð send 24. mars 2003.
-Komandi mánakvøld fer sending nr. 198 í luftina, so tað eru nógvir tímar tilsamans.
-Í januar varð byrjað við 5 min. av 3-2 sum part av Degi og Viku hóskvøld
-Tað eru fyri tað mesta Kaj Joensen og Tórður Mikkelsen, sum skiftast um at vera vertir og redaktørar á sendingini. Høgni í Jákupsstovu var eisini við at byggja sendingina upp.
-Ragnar A. Joensen er sum oftast maðurin við tekninsku ábyrgdini

## Fakta

Navn:Tórður Mikkelsen
Aldur: 49 ár
Bústaður: Hoyvík
Starv: Programmedarbeiðari á svf, við høvuðsdenti á 3-2
Ítróttargrein: Spælir hugnaflogbólt.